

www.oljan.fo

**Jan Müller** 29 - 07 - 2012

# Noyddust at steingja stóran oljuterminal

Tað norska reiðaríið Odfjell SE noyddist leygardagin at lata tann stóra oljuterminalin við havnarlagið í Rotterdam aftur, eftir at teir niðurlendsku myndugleikarnir høvdu staðfest álvarssom brek við køliskipanini á fleiri tangum á terminalinum. Partarnir fundaðust um støðuna fríggjadagin. Tá fekk Odfjell SE 24 tímar til at lata terminalin aftur, og leygarkvøldið visti tað niðurlendska vinnulívsblaðið NRC Handelsblad at siga, at alt virksemið á terminalinum var steðgað. Odfjell SE hevur leingi verið undir trýsti frá teimum lokalu myndugleikunum og umhvørvisfelagsskapum, sum hava sagt seg stúra fyri trygdini á terminalinum í Rotterdam. Nú hevur tað norska reiðaríið so slakað fyri trýstinum og biðið myndugleikarnar á staðnum um umbering, skrivar NRK. -Trygd og umhvørvisvernd hava fremstu raðfesting hjá Odfjell kring allan heimin, og støðan á terminalinum í Rotterdam er ikki ein spegilsmynd av okkara virðum, sigur Laurence Odfjell, nevndarformaður í Odfjell SE, í einum tíðindaskrivi. Tað fær stórar avleiðingar fyri keypararnar hjá reiðarínum, at terminalurin er latin aftur, tí tað, sum er á goymslu í tangunum, kann ikki flytast víðari. Tað er heldur ikki greitt, nær virksemið á terminalinum kann byrja aftur. Odfjell SE er eitt av teimum størstu reiðaríunum í heiminum, tá tað snýr seg um tangaflutning av kemiskum evnum. Felagið hevur høvuðsskrivstovu í Bergen.